dagarnar royn at bíða eitt skuldi hon longu hava í telduna alt kvøldið og út á

Samstarvsavtala
millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin

Ásannandi:

- tað stóra arbeiðsloysið
- niðgongdina í fiskastovnunum
- framhaldandi hall á Løgtingsins fíggjarlóg
- ta stóru uttanlandsskuldina
- tey [illegible], sum útlendskir lánveitarar seta, og at búskaparstøða landsins sum [illegible] er sera torfør

hava [illegible] flokkarnir sett sær fyri at reka ein **politikk**, sum er grundaður á [illegible] høvuðssjónarmið:

1) **Fíggjarpolitikkurin** miðar fulóti at fáa javnvág á Løgtingsins fíggjarlóg, samstundis sum ansað verður væl eftir almennu nýtsluni á øllum økjum.
2) **Búskaparpolitikkurin** hevur tilendamáls at økja um virksemið í samfelagnum, fyrst og fremst við at økja um framleiðsluna **bæði** til útflutnings og til heimamarknað, men eisini við øktum innlendis virksemi og við nýggjum arbeiðsskapandi tiltøkum.

   Kannað verður saman við stýrinum fyri Arbeiðsloysisskipanina, um skipanin kann nýtast sum amboð í royndunum at fáa fleiri fólk í arbeiði.

   Javnvág skal fáast í samfelagsbúskapin.

   Landsbankin, sum skal vera óheftur av politiska valdinum og vinnulívinum, fær so vítt gjørligt somu uppgávur, sum tjóðbankar hava.
3) **Fiskivinnupolitikkurin** hevur tilendamáls at gagnnýta tilfeingið í føroyskum sjógvi og tær kvotur, sum fáast aðrastaðni, á besta hátt, soleiðis at fiskurin verður viðgjørdur mest møguligt, um hetta gevur besta búskaparliga úrslitið. Við komandi tilmælum frá Bygnaðarnevndini og fiskifrøðingum sum grundarlagi verður veiðuorkan lagað til tað, sum stovnarnir tola. Fiskiskapur í altjóða sjógvi eigur at verða stimbraður.

   Tá tann endurreisti fiskiídnaðurin er komin í eina trygga legu, eiga møguleikar at verða skaptir fyri, at virki kunnu verða skipað í sjálvstøðug feløg, um hetta verður hildið gagnligt.
4) Við støði í tilmælinum frá oljuráðleggingarnevndini verður gagnnýtslan av møguligum ráevnum í undirgrundini løgd til rættis sum langtíðarpolitikkur, samstundis sum búskaparligar, sosialar og umhvørvisligar avleiðingar verða gjølla kannaðar.
5) Samstundis sum ein skipan við Løgtingsins Umboðsmanni verður sett á stovn, verður lóg um rehabilitetsreglur gjørd.
6) Føroya støða til EF verður óbroytt. Virkað verður fyri, um tørvur er á tí, at fáa víðkað tær kvotur og tey loft fyri tollfrælsi, sum eru í sáttmálanum millum Føroyar og EF. Samstundis verður virkað fyri at útvega føroyskum smáídnaði betri kor.
7) Stýrisskipanin verður broytt við støði í álitinum, sum nevndin, ið er sett at kanna stýrisskipanina, leggur fram í seinasta lagi 1. oktober 1993. Ríkisrættarligu viðurskiftini Danmarkar og Føroya ímillum verða broytt, so at føroyingar fáa fult lóggávu- og umsitingarvald yvir samfelagnum.

Tórshavn, tann 23.04.93

Føroya Javnaðarflokkur
Tjóðveldisflokkurin
Sjálvstýrisflokkurin